# Í summarhús í Fraklandi



**Navn:** Kári Sigvardsen
**Bústaður:** Ongland/Føroyar
**Aldur:** 27
**Starv:** KT
**Frítíðarítriv:** Fótbóltur og squash

*Nær fært tú summarfrí í ár?*
Mitt í juli

*Hvussu fert tú at halda summarfrítíðina?*
Eg fari av landinum í tríggjar vikur saman við Rannvá og verforeldrunum. Vit fara við Norrønu til Skotlands, koyra suður ígjøgnum Ongland, steðga so eina viku í summarhúsi í Fraklandi og fáa so eisini nakrar dagar í Danmark ávegis aftur til Føroya.

*Hví hevur tú valt at gera júst hetta?*
Rannvá, gentan hjá mær, fær lestrarprógv í Onglandi í juli, og vit gera okkum dælt av hesum við at tvinna okkara frítíðarætlanir inn í hetta. Í Fraklandi gleða vit okkum til gott veður og góða matin.

*Plagar tú at ferðast uttanlands um summarið?*
Havi búð í Onglandi seinastu árini og ferðin hevur tí altíð gingið til Føroyar hvørt summar.

*Plagar tú at ferðast í Føroyum um summarið?*
Ikki so nógv, sum eg kundi hugsa mær. Men eg royni at fáa onkran dag norði við Gjógv í hoyggingini og okkurt vikuskifti í summarhúsi onkustaðni aðrar tíðir á árinum.

*Ferðast tú hinar árstíðirnar?*
Ja, mær dámar væl at fara stuttar ferðir til ymiskar stórbýir í Europu. Seinast vóru vit í Budapest.

*Lýs summarið við fimm orðum?*
Ljósar nætur, blankir firðir, pollamjørkin, ferðing og gott veðurmót.

*Hvat er títt dreymaferðarmál?*
Tað kundi líka væl verið ein træsmátta í Finmørkini og ein strásmátta á eini fjarskotnari Kyrrahavsoyggj – bara eg var langt burtur frá gerandisrokinum og í friði saman við góðum fólki og mati.




















